# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Brøðratjóðir kappast um EM heitið

Í hesum døgum brúka nógvir føroyingar part av síni frítíð til at fylgja við europameistarakappingini í hondbólti, sum verður spæld í Eysturríki. Og hesaferð hava vit kanska eina serstaka orsøk til at fylgja við. Tí fleiri Norðurlond eru við.

Aftaná fótbólt man hondbóltur vera tann ítróttargreinin, sum flestu føroyingar hava áhuga fyri. Okkara egna hondbóltslandslið hevur júst luttikið í undankapping. Har var úrslitið einki serligt. So vit hava enn ein langan veg til at gerast javnstillaður partur av hondbóltsheiminum.

Okkara brøðratjóðir, soleiðis kenna og uppfata vit tær í hvussu er, Norðurlond, hava harafturímóti drúgvar traditiónir sum góðar hondbóltstjóðir. Og hvat vit enn halda um hetta hugtakið brøðratjóðir, so slepst ikki undan, at vit identifisera okkum meira við hesar tjóðir enn onnur lond. Tað liggur líkasum í blóðinum fyri ikki at siga í máli og mentan.

Vit fegnast, tá tað gongur væl hjá ikki minst Danmark. Og soleiðis er eisini við Svøríki og Noregi, tá tey kappast. Og ikki at gloyma íslendsku grannar okkara. Tað er líkasum, at norðurlendska vælferðarskipanin gongur og sæst aftur eisini á ítróttarøkinum.

Og í dag er ítróttur meira enn bara kapping um at vera bestur. Ítróttur er vorðin ein týðandi táttur í heilsu- og trivnaðarhøpi. Kappingarítróttin er so ein magnetur ella katalysatorur í so máta, sum vit heldur ikki eiga at undirmeta. Hon líkasum er flaggskipið, sum vísir vegin og dregur.

Við allari respekt fyri øðrum ítróttargreinum, so er okkurt serligt við hondbólti á høgum støði. Tað er ein frægd fyri eygað at fylgja við, tá liðspælið gongur sum smurt, ella tá solistarnir hava frítt rásarúm og vísa síni kynstur og genialitet. Tað er álíkt eini symfoni, tá góð hondbóltslið spæla seg til sigur. Fimleiki, skjótleiki og eisini rástyrki eru partar av hesum samanspæli. Og tá tað gongur upp í eina hægri eind er tað ein sonn njótan fyri áskoðaran.

Tað er hesa kenslu vit hava, tá vit siggja heimsins bestu hondbóltstjóðir kappast. Men aftrat tí hoyrir eisini tjóðskaparkenslan. At halda við nøkrum. Og her kemur okkara serstaki áhugi fyri okkara norðurlendsku brøðratjóðum. Og hann er so stórur, at sjálvt loysingarfólk fegnast, tá Danmark skorar ímóti teimum stóru.

Danmark, Svøríki, Noreg og Ísland eru við í EM. Danmark og Ísland munnu vera tey lond, sum standa okkum næst. Og nettup tey hava eisini staðið seg best higartil. Danmark vann EM seinast, men uppgávan hesaferð er møtimikil, tí pólendingar, fraklendingar og spaniólar eiga sera góð lið. Oftani er tað áhugin fyri teimum smáu, sum megna at syfta teir stóru, tað, sum telur mest. Og so er m.a. við Íslandi. Íslendingar hava eins og danir drúgvar hondbóltstraditiónir, og tað var einki minni enn eitt bragd, tá Ísland vann silvur við OL. Vit krossa fingrar fyri Danmark og Íslandi serliga, og tí verður tað ein tung og torfør løta, tá júst hesi bæði londini møtast leygarkvøldið.

**Sosialurin**

## Eysturoyggin – eitt kraftsentur

**ALFRED OLSEN**

løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



Eg fegnist um, at fjølmiðlar og "serfrøðingar" eru farnir undir at viðgera viðkomandi spurningar, um hvat skal gerast fyri at fólk, serliga ung fólk, kunnu koma aftur til Føroya og trívast og búleikast her, tí hettar hevur mín stóra áhuga.

Men tíverri detta bæði fjølmiðlar og "serfrøðingar" í ta grøvuna, at ein treyt fyri at fólk skal trívast og støðast í Føroyum er, at vit hava 3 kraftsentur í Føroyum, og tey skulu vera í Suðri, í Havn og í Klaksvík, meðan verandi kraftsentrið í Føroyum, Eysturoyggin, so gott sum ikki verður nevnd. Hetta meti eg vera ein bági og ein mangul í orðaskiftinum, sum neyðugt er at rætta uppá.

**Fyritreytir fyri trivna og menning**

Fyri at fólk kunnu trívast og harvið støðast í Føroyum, eru tað nógvir ymiskir faktorar, sum skulu vera til staðar fyri at skapa trivnaðin, t.d. er alneyðugt, at tey hava møguleikar og tilboð til hóskandi arbeiðspláss, skúla, mentan, frítíðartilboð, ansing til børn og gomul, hóskandi bústaðarmøguleikar, umframt møguleika til at íðka ítrótt av ymsum slag v.m.

Tær allar flestu fortreytirnar fyri trivnað og menning eru at finna í Eysturoynni, og tí er tað beinleiðis skeivt, við vilja ella óvart, at síggja burtur frá hesum økinum sum eitt kraftsentur, og at so er, skal eg her í stuttum vísa á:

**Arbeiðspláss**

Sjálvt um Eysturoyggin er tað øki í Føroyum, sum hevur fæst almenn arbeiðspláss, so er hon eitt kraftsentur innan arbeiðspláss á sjónum, við sínum nótabátum, rækjubátum, langfaratrolarum, partrolarum, línubátum, trolbátum og útróðrarbátum.

Hon er eitt kraftsentur, tá talan er um arbeiðspláss innan handverkaravinnu av ymiskum slag, eins og innan handil og skrivstovu v.m. fyri ikki at tala um fiskaframleiðslu á landi, umframt laksaframleiðslu, bæði á sjógvi og landi.

**Barna- og eldraøkið**

Hon er bæði eitt kraftsentur og tann førandi, tá talan er um ansingartilboð til tey eldru og veiku, ið sínum Ellis- og røktarheimi, Eldrasambýlum, ansingarstovnum til tey, ið hava serligan tørv á slíkum, bæði tá talan er um skúla og stovnar. Somuleiðis eru møguleikar fyri at fáa børn síni passað í vøggustovum, dagrøkt, barnagarði og frítíðarskúla v.m.

**Ítróttur**

Eisini á ítróttarøkinum er Eysturoy eitt kraftsentur, og hetta ger seg galdandi innan fótbólt, flogbólt, hondbólt, fimleik, svimjing v.m.

Umstøðurnar at íðka ítrótt eru eisini góðar viðv. fótbóltsvøllum, ítróttarhøllum, stórum fimleika-høllum, meðan svimjingini tørvar ein 25/50 metra hyl, og fótbóltur og frælsur ítróttur mangla eina fótbóltshøll, men vit kunnu fegnast um, at í økinum verður arbeitt við hesum projektum.

**Mentan**

Tá mentan og mentanarmøguleikar vera viðgjørdir, má sigast, at Eysturoyggin er í fremstu røð við dugnaligum listafólkum, bæði innan tónleik, sang, myndlist, skaldskap v.m., og umstøðurnar at framføra tónleik og sang eru góðar nú Løkshøll er komin.

**Skúlar**

Tað eru nakrir framúr góðir barna- og framhaldsskúlar í økinum, umframt handilsskúli, HF- og studentaskúli, meðan tekniski skúli, ið hoyrir til økið, antin er í Klaksvík ella Havn.

Hesar og aðrar fortreytir fyri trivnað og framburði, ið eru her í økinum, hevur viðført, at sagt verður, at Eysturoyggin er matarkovin í tí Føroyska samfelagnum.

Tí vil eg til seinast koma við eini áheitan á fjølmiðlar og "serfrøðingar" um at taka kikaran frá tí blinda eyganum, og viðgera Eysturoynna sum tað kraftsentur í tí føroyska samfelagnum, sum hon er, tí tá er vist, at vit koma at fáa nógvar góðar sendingar frá tykkara síðu, har tit koma at viðgera øll økir og út frá eini heildarmynd viðgera, hvat skal til fyri at fólk skal trívast og støðast, so vit fáa skapt vøkstur og framburð í Føroyum.

## Seks vilja vera stjóri á Havstovuni

Tað er ikki sørt av áhuga fyri at taka við sum stjóri á Havstovuni eftir Hjalta í Jákupsstovu, sum nú leggur frá sær fyri aldur. Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, upplýsti í Løgtinginum beint nú, at seks umsøkjarar eru til starvið, nú umsóknarfreistin var farin 14. Januar. Ein innstillingarnevnd skal nú meta um umsóknirnar og gera eitt tilmæli til landsstýrismannin Ein innstillingarnevnd skal nú meta um umsóknirnar og gera eitt tilmæli til landsstýrismannin. Í nevndini eru Rógvi Reinert, aðalstjóri í fiskimálaráðnum, Heri Joensen, deildarleiðari í fiskimálaráðnum, Jákup Mørkøre, samskipari í fiskimálaráðnum, Bogi Hansen, deildarleiðari á Havstovuni, og Dagunn Clementsen, biologassistentur á Havstovuni.



*Hjalta í Jákupsstovu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.